


# Skansi Offshore 135 mió. kr. í yvirskoti

**Jan Müller**

14.03.2014 - 16:01

Oljan.fo

Skansi Offshore P/F hevur í dag havt ársaðalfund, har ársroknskapurin varð lagdur fram og góðkendur.

Ársúrslitið hjá samtakinum gjørdist eitt yvirskot á 135 mió. kr., harav minnilutaeigarar eiga 53 mió. kr. Eginpeningur samtaksins við árslok í 2013 var 200 mió kr. og parturin hjá minnilutaeigarum 155 mió. kr., til samans 355 mió. kr. Við árslok í 2013 javnvigaði fíggjarstøðan hjá samtakinum við 1,5 mia. kr.

Nevnd og stjórn eru nøgd við úrslitið.

Skansi Offshore eigur og rekur 5 nýmótans frálandaskip, harav 4 arbeiða í Norðsjógvinum og 1 í Eystur Afrika.

Serliga verður fegnast um at øll skipini hava langtíðarsáttmálar við stór og vælkonsolideraði oljufeløg, sum BP, Statoil og BG.

Vónirnar fyri 2014 eru góðar, havandi í huga at flestu skipini longu eru sáttmálabundin alt árið.

Hjá Skansi Offshore P/F samtakinum starvast í dag 135 starvsfólk, harav umleið 120 sjófólk, allir føroyingar.